# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nýhugsan og nýskapan

Í gjár høvdu vit í blaðnum tvey áhugaverd mál: kronikkin hjá Hermanni Oskarsson um fiskivinnuna og so eitt vinnuserblað, ið m.a. snúi eg um skjóttvaksandi reiðaravirkið Thor í Hósvík. Kronikkin hjá Hermanni gert vart við, at (citat) *Fáa vit ikki marknaðarligar reglur inn aftur í fiskiskap, og ….. sett beinharðar kappingarreglur í gildi, so slóknar avgerandi motorurin í búskapinum. Píska vit ikki føroyskar fiskivinnufyritøkur til at vinda so nógv burtur úr fiskinum, sum til ber, so forkoma vit øllum búskaparligum framburði í landinum. Tøknilig menning hendir ikki av sær sjálvari. Undir kapitalismuni er bert ein máti at fáa fyritøkurnar at kýta seg til at gera sítt allar, allar besta. Og tað er beinhørð og eirindarleys kapping. ……Bara upp á hendan mátan fáa vit ein fiskiskap og eina fiskivinnu, sum skapar framburð og styrkir gjaldoyrað.* Hetta eru sera áhugaverd sjónarmið, borin fram, meðan heimsins mest kapitalistiska land, USA, er í ferð við at fremja eina "føroyska loysn" til tess at bjarga amerikansku kapitalismuni.

Tað er torført ikki at vera samdur við høvundan, ikki minst tí hann vísir á, at fiskivinnan er tann altavgerandi vinnan í Føroyum samstundis, sum hann ger vart við, at vit við skeivum fiskivinnupolitikki hava avlívað alt sum eitur tøkniliga og marknaðarliga tillaging í fiskivinnuni. Fiskivinnan er, sigur Hermann, avgerandi drívkraftin í føroyskari vinnumenning. Men henda drívmegin er nú avmaktað, tí vit hava gyrt hana inni við ymsum sløgum av verjugørðum, ið gera, at tann týdningarmesti tátturin í øllum, kappingin, er burtur.

Í áhugaverdu kronikkini vísir Hermann eisini á, hvussu menningin og tøknin frígera arbeiðsmegi og úrslitið er, at alt færri fólk eru í fiskivinnuni. Í hesum høpi kundi verið áhugavert at knýtt hesa niðurstøðu til søguna um Thor í serblað okkara, **Vinnan**. Her er talan um eina føroyska succéssøgu, eina søgu um ungar framskygdar og ídéríkar menn, ið hava dugað at gagnnýta fylgjurnar av broytingunum í fiskivinnuni, ið hava sæð møgukleikarnar fyri skapan og nýmenning. Her eru vinnulívsmenn, sum hava sæð møguleikarnar í tí framúr dugnaliga føroyska sjófólkinum, men sum ikki longur kann ella vil vera í fiskivinnu – vinnulívsmenn, ið við professionellum og visjonerum starvsfólkapolitikki hava bygt upp eitt topprofessionelt starvslið. Her er talan vinnulívsmenn, sum hóast vánaligar samfelagskarmar, hava megnað at koma inn á ein altjóða marknað, har kappingin er sera hørð, men har vit hava nakrar fortreytir og førleikar, ið gera okkum før fyri at taka kappingina upp. Við støði í báðum søgum ber til at staðfesta, at tað er bæði neyðugt og møguligt at byggja upp alternativar vinnur í Føroyum, ið gagnnýta altjóðagerðina og byggja á førleikar, ið eru til taks. Skal menningin halda fram á eitt nú hesum vinnuøki, krevur hetta nútímans karmar, ið aftur hava sum fyritreyt, at politikarar skilja nýggju og broyttu fortreytirnar fyri vinnurakstri í Føroyum.

**Sosialurin**

## Framtíðar fíggjarvánir



**GUNVÁ VIÐ KELDU**
býráðslimur í Klaksvíkar Býráð

Á býráðsfundi 23. september samtykti Klaksvíkar Býráð eina tillaging av fíggjarætlanini fyri inniverandi ár, við tí úrsliti at fíggjarætlanin fyri 2008 væntandi fer at vísa eitt hall á knappar 27. mió kr.

Tey seinastu árini eru inntøkurnar vaksnar ár um ár. Væntandi verða inntøkurnar fyri 2008 um 134 mió kr. Vit kunnu samanlíkna hetta við árið 1998, tá inntøkurnar vóru knappar 79 mió kr. Hetta er næstan tvífalding í 10 ár.

Samstundis sum inntøkurnar eru vaksnar, er raksturin fylgdur við, og meiri enn tað. í 1998 varð raksturin gott 43% av inntøkunum. Sambært tølum frá 2007, fer raksturin avstað við umleið 68% av inntøkunum. Sum tað sær út nú, fer raksturin avstað við umleið 80% av inntøkunum komandi ár. Um hetta verður gongdin er sjálvsagt at ikki nógv verður eftir at gera íløgur og útbyggja bý okkara fyri.

**Verulig viðgerð**

Tað er ikki nóg mikið, at vit hyggja eftir rakstrinum og fara inn at finna sparingar. Meiri grundleggjandi arbeiðið má verða lagt í tað. Vit mugu politiskt gerast samd um, hvussu stórir karmarnir til hvørt einstakt øki skullu verða og síðani fara inn á ymsu økini og gera rationaliseringar.

Ein býur við okkara støðd, hevur ikki ráð at veita allar veitingar. Spurningurin er, um vit skulu velja nøkur kjarnuøki út, sum vit veruliga eru góð til og síðani gera upp, hvussu vit vilja handfara hini økini.

Ein upplagdur møguleiki er at leggja nakrar uppgávur út á tað fría vinnulívið, sum er ríkt í Klaksvík. Hetta krevur eina dygga stýring, men í síðsta enda trúgvi eg, at hetta hevði givið okkum meiri pening til íløgur, sum eg síggi vera ógvuliga umráðandi.

**Skattaprosentið**

Nógv hevur verið tosað ímillum politikarar, um vit møguliga skuldu hækka skattaprosentið. Grundgevingarnar hava verið, at økið eru løgd út á kommunurnar frá landinum, har peningur ikki er fylgdur við, og eisini at vit eru í ferð við stóra útbygging á skúlaøkinum.

Eg haldi ikki, at tað er klókt at hækka skattaprosentið, sum støðan er í samfelagnum í dag. Fíggjarvánirnar eru ótryggar í løtuni, eisini er umráðandi at vit fáa veruliga stýring á fíggjarøkið, so ein hækking av skattaprosentinum ikki bara fer í eitt "hol" og skattaborgarin ikki veruliga sær, hvat tað er, hann skal gjalda meiri skatt fyri.

Tað verður tungt, tó neyðugt arbeiðið hjá komandi býráði at taka alla fíggjarstýringina upp til viðgerðar.

## Tjóðveldi í Tórshavnar býráð



**LEIVUR HANSEN**
býráðslimur og valevni hjá Lista E

So stundar aftur til býráðsval.

Tjóðveldi fór fyri fýra árum síðani við góðum treysti til val við lyftum um m.a. at lætta um gerandisdagin hjá barnafamiljum og teimum gomlu.

Vit høvdu okkara besta valúrslit nakrantíð og komu eftir valið í samgongu. Úrslitini síðani tala fyri seg:

Foreldragjaldið á dagstovnum er lækkað úr 30 í 25 prosent, systkinaavsláttur er settur í verk og barnafrádrátturin er hækkaður upp í 5.500 krónur – tann hægsti í landinum.

Á eldraøkinum eru 24 nýggj røktarheimspláss komin aftrat á Tjarnargarði, og nýtt eldrasambýli við 10 búplássum er latið upp í Mattalág. Nýtt røktarheim verður fyrireikað Yviri við Strond, og heimavitjunartænastan (sum TK av sínum eintingum setti á stovn) er útbygd. Eisini hevur Tórshavnar kommuna sum tann einasta kommunan í landinum sett Eldraráð á stovn at vera millumlið millum kommununa og fólkið í eldrapolitiskum málum.

Vit løgdu dent á at fáa gjørt eina heildarætlan fyri útbygging av kommunalu skúlunum. Nýggjur stásiligur skúli er/verður bygdur við Løgmannabreyt í Hoyvík, og fyrireikingarnar til nýggjan skúla á Argjum eru komnar væl áleiðis. Arbeiðið at umvæla hinar skúlarnar er somuleiðis í gongd.

Vit lovaðu eisini at virka fyri at útvega fimleikarfeløgunum sømiligar hallarumstøður til venjing og kapping á altjóða støði og at byggja ítróttarvøll til frælsan ítrótt.

Ítróttarvøllurin verður tikin í brúk fyrsta dagin, og í næstum verður spakin settur í fyri fimleikarhøllini.

Vit lovaðu at útvega tónleikarhugaðum eitt nógv saknað spælistað í hjartanum av býnum. Tey hava nú fingið innivist í gamla Reinsarínum.

Vit í Tjóðveldi fóru somuleiðis til val upp á at útbyggja Bussleiðina til eina álítandi flutningsleið hjá borgarunum og gera hana til eitt veruligt alternativ til bilin til frama fyri umhvørvið og ferðsluna. Eisini hetta er vorðin ein sólskinssøga í dag.

So, sum tú sært, so er Tjóðveldi ein flokkur, ið heldur orð. Gerandisdagurin hjá m.ø. barnafamiljum og teimum gomlu er vorðin léttari við Tjóðveldi í samgongu í Tórshavnar býráð.

Í næstum fara vit at kunngera, hvørji hjartamál okkara eru til hetta býráðsvalið. Tað verður ikki bara orðaskvaldur, men ítøkiligar ætlanir fyri, hvat vit ætla at raðfesta næstu fýra árini.

Tú kanst líta á, at vit eisini hesa ferð fara at halda orð.

Vel tí Lista E!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.